Týsdagur

Dimmalætting

Nr. 171 • 119. árgangur • 22. oktober 1996 • Tlf. 11212 • Fax 10941 • e-mail: dimma@olivant.fo

— ÁLÍTANDI TÍÐINDI

7 kr.

»Okkara Gulu«

»Ítróttur«

Kristiligi Fólkaflokkurin bjóðar Miðflokkinum vælkomnum

Um val var í dag, høvdu teir báðir »kristiligu« flokkarnir á tingi, Miðflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin, fingið 14,9% av atkvøðunum. Saman høvdu teir sostatt verið ein av størru flokkunum, størri enn Javnaðarflokkurin. Og nú friggjar Kristiligi Fólkaflokkurin til Miðflokkin.

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

– Eg skilji tey væl, ið undrast á, at Kristiligi Fólkaflokkurin og Miðflokkurin ganga í tveimum. Vit eru so mikið líkir í politiskum sjónarmiðum, at vit áttu at kunna virka sum ein sterkur flokkur.

Hetta sigur formaðurin í starvsnevndini hjá Kristiliga Fólkaflokkinum, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokki, Niels Pauli Danielsen.

Og formaðurin í Kristiliga Fólkaflokkinum er opin fyri fleiri møguleikum. Hann heldur, at hava fólk hug at koma inn í Kristiliga Fólkaflokkin, og tey kunnu taka undir við stevnuskrá floksins, ja, so eru tey vælkomin.

– Eisini limirnir í Miðflokkinum eru væl komnir at gerast limir í Kristiliga Fólkaflokkinum. Á tann hátt kundu vit verðið ein lutfalsliga stórur og sterkur flokkur á tingi. Ein sterkur flokkur, sum byggir á kristnu siðalæruna, men sum ikki ger mun á kristnum, sigur Niels Pauli Danielsen.

Formaðurin í Kristiliga Fólkaflokkinum sigur, at leiðslan, sum myndar Miðflokkin í dag, sjálv valdi at venda Kristiliga Fólkaflokkinum bakið. Kristiligi Fólkaflokkurin koyrdi ongan út.

– Tí vil eg siga, at tað er upp til teirra, um teir koma aftur. Teir eru vælkomnir, sigur Niels Pauli Danielsen.

Hann heldur tað vera púra burtur við, at tveir flokkar, sum eru so líkir, skulu ganga í tveimum. Men hann heldur tað samstundis vera óhugsandi, at Kristiligi Fólkaflokkurin fer upp í hjá Miðflokkinum. Tað má vera øvugt, tí tað er Kristiligi Fólkaflokkurin, ið er upprunaligi flokkurin.

Líkjast rættiliga nógv

At Miðflokkurin og Kristiligi Fólkaflokkurin, Føroya Framburðs- og Fiskivinnuflokkur líkjast nógv, sæst bara við at kaga eitt sindur í stevnuskránnar hjá flokkunum báðum.

Í skúlamálum siga báðir flokkarnir til dømis um morgunandaktir í skúlunum:

»Reglulig morgunandakt eigur at vera í øllum fólkaskúlanum«.

Báðir flokkarnir tosa um sjúkuna AIDS í stevnuskráum sínum. Miðflokkurin sigur at »upplýsing um sjúkuna AIDS eigur at fremjast í tráð við bíbliunar áskoðan um samlív millum mann og kvinnu«.

Kristiligi Fólkaflokkurin sigur, at »stríðið móti eyðkvæmi (AIDS) og øðrum kynssjúkum eigur at vera bygt á kristnu siðalæruna«.

Lesið á síðu 4

Mynd: Diml./Álvur Haraldsen

Estlendskir yvirmenn gestir umborð á »Triton«

Í eina viku hava tríggir hermenn í estlendsku sjóverjuni vitjað umborð á sjóverjuskipinum, sum ger tænastu undir Føroyum í løtuni.

BEATE L. JENSEN

Eftir politisku broytingarnar eystanfyri, tá m.a. Jarntjaldið varð tikið niður, er samskiftið millum vestur og eystur broytt munandi.

Estland er eitt av teimum trimum baltisku londunum, sum altíð hevur verið sera vesturlendskt sinnað, kanska serliga yvirfyri Danmark. Einasta, sum skilir baltisku londini frá Norðurlondum, er Eystrasalt – og so málið.

Fyri nakað síðani gjørdu danskir og estlendskir myndugleikar eina umfatandi avtalu. Sambært hesi vitjaði Margrethe drotning og Henrik prinsur í Tallinn.

Hetta var bert ein lítil partur av vinaravtaluna landanna millum.

Ein onnur er, at estlendskir heryvirmenn av og á hava møguleika at gera tænastu í styttri tíð umborð á donskum sjóverjuskipum, ið eru bæði nýggjari og meiri nýmótans enn estlendsk.

Í farnu viku vóru tríggir yvirmenn frá estlendsku sjóverjuni umborð á danska sjóverjuskipinum »Triton«, sum í løtuni rekur sjóverjutænastuna undir Føroyum. Ovasti umborð er Vagn Kristensen, kommandørkapteyni.

Viktor Vassilij, fenrikkur, og sersjantarnir Dmitri Kasper og Timur Grigorjev,hava í eina góða viku starvast umborð á »Triton« sum ein partur av føstu manningini.

Teir dugdu hvørki enskt ella danskt, og var uppgávan sum tulkur latin Thomas Christensen, reservaofficeri, upp í hendi at greiða.

Læsið meiri á s. 6

Báturin hjá Biofar, sum Statoil, Mobil og Enterprise Oil hava latið til kanningina Farcos

Mynd: Álvur Haraldsen

Oljufeløgini gjalda Farcos verkætlanina

Royndarstovan Biofar í Kaldbak er ein teirra, ið higartil hevur vunnið fitt av peningi burtur úr oljuvinnuni. Oljufeløgini gjalda 10.000 pund árliga í stuðli til kanningina Farcos. Ein slík kanning skal fyriliggja, áðrenn farið verður undir at útvinna olju.

DIA MIDJORD

Á vári 1995 varð ein trý ára avtala gjørd millum trý oljufeløg og royndarstovuna Biofar í Kaldbak.

Verkætlanin umfatar, at Biofar ger eina kanning av øllum firðunum runt í Føroyum. Í dag er eitt oljufelag komið aftrat, so tey fýra oljufeløgini – Mobil Oil, Amerada Hess, Coneco og BP - láta 10.000 pund í stuðli árliga. Philips og Texaco hava eisini sýnt verkætlanini áhuga.

Umframt hava Statoil, Mobil og Enterprise latið 325.000 krónur, sum eru oyramerktar til bátin, ið verður brúktur til allar hesar kanningarnar.

Stutt um kanningina kann sigast, at fólk frá Biofar vitja runt á ymsu firðunum. Biologarnir kanna síðan sjóvøksturin og annað á staðnum. Verkætlanin ella kanningin skal vera liðug, áðrenn byrjað verður at bora eftir olju. Slík kanning hevur eisini verið gjørd í øðrum londum, har oljan hevur verið uppá tal.

Gunnar Djurhuus frá Biofar sigur, at verkætlanin Farcos hevur givið Biofar nakað nógv meira og støðugari arbeiði. Umframt hevur Biofar fingið stórt gagn av bátinum, sum Statoil hevur latið.

– Vit vóru í tí støðu, at vit høvdu brúk fyri einum báti til Biofar-2 ætlanina. Tí kom tað sera væl við hjá okkum, sigur Gunnar Djurhuus.

Hóast Biofar í løtuni arbeiðir við Farcos-verkætlanini, so verður eisini arbeitt við Biofar-2 verkætlanini. Umframt leiðaran eru trý fólk í føstum starvi. Harafturat fær Biofar hjálp uttanífrá til okkurt arbeiði.

Í BLAÐNUM Í DAG

Teir gulu og bláu enn einaferð FM-vinnarar

Í allar seinasta landskappingardystinum hjá 1. deild fall avgerðin um FM-heitið. Liðið, sum hevur ligið fremst alt kappingarárið, dró longsta stráið og streyk avstað við gullinum fjórða árið á rað. Við hesum er staðfest, at GÍ er og verður besta fótbóltslið í landinum.

Ítróttur – í dag 20 síður

Tørvur á føroyskari rødd á Ríkissjúkrahúsinum

Herfyri vísti føroyski presturin í Keypmannahavn, Bergur Jacobsen, á, at føroyskir sjúklingar á Ríkissjúkrahúsinum tørva eina føroyska rødd. Óssur Berghamar, sum í 23 ár hevur vitjað føroyskar sjúklingar á Ríkissjúkrahúsinum, er samdur við presti.

Síða 3

Politistøðin í Klaksvík varð reist fríggjadagin

Arbeiðið við nýggju Politistøðini í Klaksvík er nú komið so mikið langt, at teir fríggjadagin í farnu viku reistu bygningin. Ætlanin er, at alt byggiarbeiðið skal vera liðugt um hálvan mars. Tá skal bert uttandura málaraarbeiðið vera eftir.

Síða 6

Ferðslan í Portugal ein stór landaskomm

Onga aðrastaðni í vestureuropeiskum londum doyggja so nógv í ferðsluni sum í Portugal. Fleiri átak hava verið sett í gongd seinastu tíðina, fyri at fáa rætta upp á hetta, men higartil uttan úrslit. Nógvar ymiskar meiningar eru um, hví skilið er so ringt á portugisisku vegunum.

Síða 8

Fleiri bilar hava mist nummarplátuna

Politistøðirnar kring landið fingu fyri kortum greið boð frá Gjaldstovuni, at nummarpláturnar hjá teimum, ið ikki høvdu rindað vegskatt, skuldu takast. Nógvar plátur eru tiknar og leitað verður eftir fleiri. Eisini eftirstøður í trygging kosta nummarplátuna.

Síða 3

✔ Bøkur
✔ Brævørk
✔ Brævbjálvar
✔ Fakturar
✔ Heftir
✔ Kontoavrit
✔ Visittkort
✔ o. m. a.

Verður skjótt og væl greitt úr hondum á

Dimmalætting

Tlf. 11212
Fax 17681

Flogfrakt/ Sjófrakt

SAFARI TRANSPORT

Tlf. 1 2222

Alt sum skal fraktast til og úr Føroyum.
Vit avgreiða øll skjøl.

DAGSINS RÆTTUR

MÁNADAG 21.10.
Farsbreyð

TÝSDAG 22.10.
Paprikagryta

MIKUDAG 23.10.
Rísrættur ella fiskafrikadellur

HÓSDAG 24.10.
Lasagna v/salati

FRÍGGJADAG 25.10.
Fleskasteik

LEYGARDAG 26.10.
Mexikanskur hakkibuffur

Perlan